# Alex avgjørdi fyri AB




**AB ER VIÐ ENN**

*Eftir 1-0 heimasigurin á TB leygardagin, er AB einasta liðið av teimum átta, ið eru eftir í steypakappingini, sum ikki spælir í Vodafonedeildini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**LØGMANSSTEYPIÐ** Tað, sum kundi sæð út sum ein forsmakkur upp á toppdyst í 1. deild, endaði við, at AB vann á TB við einum máli

Hilmar Jan Hansen

Komandi kappingarárið skal AB aftur royna seg í næstbestu deildini, og nógv bendir á, at ætlanin hjá argjamonnum er ikki, at steðgurin skal gerast ov drúgvur. Leygardagin tók AB ímóti TB, sum síðani 2006 hevur roynt at vunnið seg uppaftur í bestu deildina.

Ikki var sørt, at hetta kundi mint um ein komandi toppdyst í 1. deild, tí AB verður allarhelst millum tey fremstu og TB man ætla sær tað sama, hóast eydnan ikki hevur verið við seinnu árini.

Dysturin á Argjum gekk í fyrra hálvleiki fyri tað mesta eftir ætlanini hjá heimaliðnum, ið hevði meira spæl og eisini átti munin í málkjansum. Tá góður hálvur tími, bragdaði eisini, tí eftir at Tróndur Sigurðsson hevði skotið á stongina, stakk bólturin útaftur til Alex Mellemgaard, ið var tryggur og setti í málið til 1-0.

Sjálvt um aðrir kjansir vóru fyri steðgin, komu ikki fleiri mál, og í seinna hálvleiki vendi dysturin sær eitt sindur á, tí nú var tað TB, ið royndist betri og í fleiri førum fekk lagt gott trýst á AB. Men tað var framvegis uttan nakað beinleiðis úrslit, annað enn at heimaliðið ikki ordiliga slapp í gongd, tí einki mál kom, og so vann AB 1-0.

Argjamenn gjørdust ov stuttir í Vodafonedeildini í fjør, men í fjórðingsfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið koma teir undir øllum umstøðum at møta einum av liðunum, sum nú manna bestu deildina, tí nú átta lið eru eftir í steypakappingini, er AB tað einasta av teimum, sum er úr lægri deild. Somuleiðis er AB einasta umboð, høvuðsstaðurin eigur eftir í kappingini...

hilmarjan@sosialurin.fo

# Einki undur í Klaksvík

**LØGMANSSTEYPIÐ** Hóast KÍ ikki var serliga sannførandi, nú Undrið vitjaði í Klaksvík leygardagin, hendi einki undur, ið forðaði KÍ at koma víðari í steypakappingini

Hilmar Jan Hansen

Undrið, sum fyri viku síðani vann seg víðari til fyrsta umfar við at vinna heili 6-0 á MB, hevði valt at lagt sín heimadyst í Klaksvík, og tað høvdu klaksvíkingar einki ímóti. Undrið spælir í triðbestu deildini, so tað skuldi mestsum gjørt tað sama, hvar liðið møtti KÍ, tí uppflytararnir í bestu deildina áttu undir øllum umstøðum at verið betra liðið.

Tað var KÍ eisini, men kortini gjørdist talan ikki um ein av teimum stóru og mest sannførandi dystunum. Tá avtornaði, vann KÍ 2-0, sum sjálvandi var nóg mikið, men neyvan heilt nøktandi hjá klaksvíkingum, ið fáa heilt aðra mótstøðu at arbeiða við, tá sjálv landskappingin fer í gongd.

KÍ fekk annars nakað, ið kundi sæð út sum ein ynskibyrjan, tí minni enn eitt korter var farið, tá Høgni Madsen fekk bóltin frá Hjalgrím Elttør, ið kundi havt skotið sjálvur, og fuglfirðingurin kundi lættliga leggja bóltin í málið til 1-0.

Men hóast tað nú skuldi verið klárt til eitt ella annað slag av málveitslu, spurdist lítið burturúr hjá KÍ, ið ikki skapti stórvegis kjansir. Undrið skapti so at siga púrt einki, men stríddist mest við at verja, og heldur ikki megnaðu gestirnir at seta KÍ undir trýst. Heldur var tað KÍ, ið vantaði neyðuga hugflogið fyri at fáa meira burturúr.

Kanska sigandi fyri dystin, so var seinna málið hjá klaksvíkingum eitt sjálvmál, sum kom miðskeiðis í seinna hálvleiki, tá Øssur Jacobsen var óheppin í verjuni hjá Undrinum.

# Bartal gjørdi bart

**LØGMANSSTEYPIÐ** Við trimum málum var Bartal ein av høvuðsorsøkunum til, at Skála fór so syngjandi úr ársins útgávu av steypakappingini

Hilmar Jan Hansen

Fyri einari viku síðani gjørdist hann – eins og onkur annar av liðfeløgunum – greipuvinnari í flogbólti við ÍF, og leygardagin gekk hann á odda, tá ÍF sendi Skála út úr steypakappingini í fótbólti.

Bartal Eliasen var tríggjar ferðir upp á spæl, tá hann í seinna hálvleiki við einum ektaðum »hat-trick« – trý mál á rað í sama hálvleiki – sendi ÍF frá 1-0 upp á 4-0. Og tá hevði hann enntá eina ferð í fyrra hálvleiki skallað bóltin í Skálamálinum, men varð dømdur fyri rangstøðu.

Málið til 2-0 var eisini ein skallari, men hesa ferð uttan rangstøðu, og tveir minuttir seinni var tað frá brotssparksblettinum, at Bartal kundi økja til 3-0, eftir at Nenad Saric var farin um koll. Og gott korter seinni kom so triðja málið, tá trunkaspæl spurdist burturúr inni í Skála-brotsteiginum, eftir at Frank Poulsen hevði sent hornaspark innfyri. Bartal var avgjørdur, tá bólturin endaði hjá honum, og so var 4-0.

Frank var annars maðurin, sum var upphavið til 1-0 málið, sum var tað einasta fyri steðgin, tá hann smekkaði til úr langari frástøðu, men rakti ein verjuspælara hjá mótstøðuliðnum, so bólturin broytti kós og endaði í málinum hjá prísgivna Esbern Jacobsen í málinum hjá Skála.

Við tveimum tøttum málum ímóti endanum kom eisini Høgni Zachariassen á máltalvuna. Tað fyrra fekk hann fimm minuttir fyri tíð eftir enn eitt gott hornaspark frá Frank Poulsen, og tveir minuttir seinni var Høgniu aftur á blettinum, tá Uni Reinert Petersen sendi innfyri.

Einki var at siga til ÍF-sigurin, ið kundi verið enn størri, tí eitt nú skjeyt Dánjal á Lakjuni á stongina. Men í øllum førum kundu tey í Fuglafirði staðfesta leygardagin, at steypafinalistarnir frá í fjør fingu eina flúgvandi byrjan í kappingini um Løgmanssteypið hesa ferð.